# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Meirilutin ræður

So eru bý- og bygdaráðvalini av, og veljarin hevur talað. Samgongur eru longu skipaðar ella eru undir skipan, soleiðis virkar skipanin nú einaferð í verki, og tað er sum kunnugt meirilutin, sum ræður. Meirilutarnir eiga tó at leggja sær í geyma, at eitt gamalt og grundleggjandi princip í kommunalu skipanini er, at øll sjónarmið eiga at hava ávirkan í tann mun, tey eru umboðað í bý- og bygdaráðum. Tað er tí orsøk til at ávara allar tær nýggju og gomlu samgongurnar ímóti majorisering t.v.s. at seta alla andstøðu uttan fyri alla ávirkan. Hetta er ongantíð gott fyri fólkaræðið.

Kommunuvalið í gjár var áhugavert á mangan hátt, kanska serstakliga í teimum stóru og størru plássunum. Í høvðusstaðnum fekk samgongan, ið hevur sitið seinastu fýra árini, dygga álitsváttan. Henda álitisváttan er serstakliga galdandi fyri sitandi býráðsformann, Heðin Mortensen, sum sló øll met higartil við 2200 persónligum atkvøðum. Sigurin er væl og virðiliga uppiborin. Heðin hevur verið høvðustaðaøki, borgarum og vinnulívi ein sera góður, íðin, opin og dugnaligur býráðsformaður. Menningin hevur verið stór, men vælskipað og nú verður spennandi, hvussu samgongan við Tjóðveldi, sum jú heldur fram, fer at raðfesta. Undirstøðukervi, ítróttin, barna- og eldraøkini hava verið raðfest frammalaga. Nú má túrurin vera komin til vinnulív, umhvørvi, mentan og barna- og ungdómsarbeiði og tilboð til hesar bólkar. Tað er neyvan av tilvild, at fyrstvaldi á Tjóðveldislistanum og komandi fyrsti varabýráðsformaður er djúpt engasjeraður í ungdómsarbeiði. Vit kunnu nevna íbúðar- og bústaðarmálið, har tørvurin á íbúðum til ung, til breðkað og til pensionistar er sera stórur. Her er nóg mikið at gera hjá einum komandi býráð við góðum fíggjarligum støði, við einum eldhugaðum býráðsformanni og einum ikki minni eldhugaðum næstformanni á odda.

Kommunuvalið var eitt gott val fyri kvinnurnar og sostatt eitt demokratiskt framstig. Alt bendir á, at Føroya næststørsti býur, Klaksvík, fær sín fyrsta kvinnuliga borgmeistara. Hetta er nakað av einari avbjóðing, eftirsum kommunan hevur stórar fíggjarligar trupulleikar at dragast við. Men kenna vit hana rætt, so fer Gunvá við Keldu undir uppgávuna við treysti og dugnaskapi.

Ein skal helst vara seg fyri at gera landspolitiskar niðurstøður av kommunuvali. Hartil eru úrslitini hjá flokkunum ov torskild og uttan iva ávirkað av lokalum og persónligum viðurskiftum. Kortini mugu tey sera ójøvnu úrslitini kring landið geva teimum stóru flokkunum nakað at hugsa um. Vit hugsa serstakliga um valúrslitini hjá stóru flokkunum í t.d. Vági, á Tvøroyri, í Tórshavn og í Klaksvík, har broytingar eru hendar, sum ivaleyst geva ávísum froksleiðslum høvuðbrýggj. Vit í Miðlahúsinum ynskja øllum nývaldum sum afturvaldum bý- og bygdaráðslimum hjartaliga til lukku við vónini um, at tey øll fara at virka til gagns fyri lokalsamfelagið og borgarar tess.

**Sosialurin**

## Klaksvíkar og Suðuroyar sjúkrahús hava týðandi leiklut í framtíðar sjúkrahúsverki í Føroyum



**HANS PAULI STRØM**
landsstýrismaður í heilsumálum

**Vit skulu skipa okkara sjúkrahúsverk gagnligt og skilagott fyri allar landsins borgarar – tað vil siga, eisini við hjartanum. So vit fáa eitt sjúkrahúsverk, sum tænir øllum borgarum landsins best**

Tí er tað ein ósaklig ræðukampanja frá Jákupi Petersen og øðrum at brúka í kommunalpolitiska valstríðnum, at ein felags yvirskipað leiðsla fyri føroyska heilsuverkið verður ein hóttan móti smáu sjúkrahúsunum. Tað er kanska so, at Jákup Petersen og møguliga onnur við vilja ráða yvir teirra egnu kongaríkjum. Men tað er ikki vist, at tað er tað skilabesta fyri føroyska sjúkrahúsverkið.

Tvørturímóti teirra ræðukampanju er endamálið, at vit kunnu samskipa og fáa sum mest burtur úr øllum okkara tilfeingi í heilsuverkinum, har teir ymsu partarnir skulu virka saman heldur enn at kappast móti hvør øðrum.

Tá tað snýr seg um sjúkrahúsverkið, skulu vit ikki lata politikkin stýrast av nøkrum seráhugamálum, ið ikki vilja hyggja at heildini og felags ágóðanum, men heldur vilja tvíhalda um sítt egna vald.

**Sjúkrahúsverk við skili - og við hjartanum!**
Men vit skulu sanniliga heldur ikki lata okkum stýra av køldum rokni-meistarum og rationaliseringsekspertum – tí so hevði alt virksemið bara verið miðsavnað í høvuðstaðnum.

Tað vilja vit ikki. Tí vit skulu skipa okkara sjúkrahúsverk gagnligt og skilagott fyri allar landsins borgarar – tað vil siga, eisini við hjartanum! So vit fáa eitt sjúkrahúsverk, sum tænir øllum borgarum landsins best, bæði teirri helvtini, sum býr í miðstaðarøkinum og hini helvtini, sum hevur sína dagliga tilveru í útjaðarinum.

**Framvegis trý sjúkrahús**
Í sjúkrahúslógini er ásett, at tað skulu vera 3 sjúkrahús í Føroyum. Tað er eingin ætlan at broyta hetta. Og skuldi nakar verið í iva, so fingu vit prógv fyri í fjør, at tey smáu sjúkrahúsini so avgjørt hava serstakar fyrimunir at bjóða í einum samanhangandi føroyskum Heilsuverkið. Her hugsi eg um sjúklinganøgdsemiskanningina, sum m.a. vísti, at sjúklingarnir settu stóran prís upp á tænasturnar sum vóru veittar á teimum smærru sjúkrahúsunum.

Endamálið við at seta ein heilsuverkstjóra, er at samlaða tilfeingið í føroyska heilsuverkinum verður gagnnýtt best møguligt, samstundis sum ein skipað menning verður løgd til rættis, sum er galdandi fyri alt heilsuverkið.

Sjálvandi koma øll 3 sjúkrahúsini eisini at hava teirra egnu lokalu leiðslur - um enn hesar skulu leggja virksemi til rættis út frá heildini í huga í samráð við teirri yvirskipaðu leiðsluni, sum nú fer at verða myndað við einum heilsuverkstjóra.

Tí er tað skeivt og villleiðandi, tá Jákup Petersen og onnur, ið muta ímóti ætlaðu samskipanini av sjúkrahúsverkinum, ræða fólk við, at nú skal ein stjóri í Havn seta læknar, sjúkrarøktarfrøðingar og vaskifólk í Klaksvík og Suðri.Tað verður sjálvsagt eisini frameftir uppgávan hjá leiðslunum á sjúkrahúsunum at skipa fyri vanliga dagliga rakstrinum og umsitingini, hará eisini at seta fólk ella loysa tey í starvi.

**Smáu sjúkrahúsini gagnnýtast betri**
Tað hevur ofta verið frammi, at tað er tøkur kapasitetur á teimum smærru sjúkrahúsunum. Hetta skal gagnnýtast betur enn tað verður gjørt í dag. Við eini yvirskipaðari tilgongd skulu vit tryggja, at alt tilfeingið á øllum trimum sjúkrahúsum verður gagnnýtt á besta hátt. Tí eru eisini ítøkiligar ætlanir um, at loysa upp fyri fløskuhálsum, so at sjúklingar skjótari kunnu sleppa framat, m.a. við at verða fluttir og samlaðir til ávísar viðgerðir, har sum kapasitetur er – antin tað er í Havn, í Klaksvík ella í Suðuroy.

Tey sum varða av og eru góð við sjúkrahúsini í Klaksvík og í Suðuroy skulu ikki ber nakran ótta fyri, at landsstýrismaður í heilsumálum ikki vil gera alt fyri at tryggja hesum týdningarmiklu lokalu heilsustovnum ein týðandi leiklut í framtíðar føroyska sjúkrahúsverki. Umframt at tey skulu røkja neyðugar uppgávur sum nærsjúkrahús í økjunum, skulu hesi sjúkrahús eisini kunna átaka sær nýggjar uppgávur, m.a. í fólkaheilsupolitiskum høpi, og t.d. sum miðdeplar í eini landsfevnandi skipan fyri rehabilitering ella uppafturvenjing í Føroyum.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.